VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Sjálvstýrisflokkurin og Sambandið í smáum skóm

Seinnu árini eru stjóralønir í ti privata hækkaðar munandi. Vit kunnu til dømis nevna bankastjórar, sum, rætt ella ikki, í dag fáa fleirfalt tað, sum bankastjórar fingu fyri 10 árum síðani. Fiskiveiðuflotin hevur altíð havt góðar yvirmannalønir, og í dag er einki øðrvísi. So er tað tað almenna. Tað almenna hevur ikki líka góðar lønir sum tað privata, tá tað kemur til ovastu rók, men kann harafturímóti bjóða ein tryggleika og stabilitet, sum tað privata ikki klárar at geva.

Her er tó eitt markant undantak. Tað eru landstýrismenn. Hesir hava hægstu ábyrgd fyri raksturin av øllum tí almenna. Teir verða settir í eitt áramál, og kunnu uppsigast við ongum varsli, móti at fáa eitt hálvt ára løn í bíðipengum, ella uppsagnarløn, um man vil. Hetta er ikki nøkur luksusskipan, eisini havandi í huga, at ein landsstýrismannaløn er ikki nær í námind t.d. einari stjóraløn í einum banka, og tað munnu vera fáir skiparar, sum fáa eina lægri hýru enn eitt landsstýrisfólk fær í løn.

Reint prinsipielt eigur Løgmaður at fáa hægstu almennu løn í landinum, og landsstýrismenn eiga at koma honum á baki. Harafturat er eisini umráðandi, at treytirnar hjá hesum fólkum eru somikið góðar, at tær skulu vera lokkandi hjá teimum best útbúnu og best kvalifiseraðu fólkunum, sum eru før fyri at lyfta ta stóru ábyrgd, tað er at vera landsstýrismaður/kvinna. Tað er ikki støðan í dag, og um Løgtingið nú, sum Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin skjóta upp, fer í teir heilt smáu skógvarnar, og avtekur tað hálva árið, sum ein landsstýrimaður fær í bíðipengum ella, meiri beinrakið, í uppsagnarløn, um viðkomandi fer í alment starv beinanvegin, so er tað eitt heilt klárt signal um, at Føroya Løgting vil gera treytirnar hjá landsstýrisfólki verri enn í dag. Fyriuttan at tingfólk burdu havt annað at tikist við, so er tað eisini eitt signal um, at man ikki metir, at tað er nakar trupulleiki at fáa skikkað landsstýrisfólk.

Tað er nú einaferð so, at eitt landsstýrisfólk, av góðum grundum, ikki kann arbeiða í uppsagnartíðini, og tí skal uppsagnarlønin síggjast sum eia fráfaringarsamsýning. Tað er rættiliga smáttskorið at fara at krevja mótrokning fyri hasa lønina hjá nøkrum fáum fólkum, sum einki hevur at siga fyri føroysku fíggjarlógina.

At Sambandsflokkurin viðhvørt fellir í grøvuna, har lægsti felagsnevnari avger, hvat landsstýrisfólk skulu fáa í løn og pensión, er einki nýtt, men tað má sigast at vera eitt sindur hugstoytt, um tann nýggi Sjálvstýrisflokkurin ikki klárar at lyfta seg uppum hatta støðið, har man leflar fyri føroysku fólkasjúkuni og smáligheitini.

Sosialurin

Hvør sáar misálit?

HANUS KAMBAN

Ein viðmerking til Høgna Hoydal

Í stuttari grein í Sosialinum fyri tann 5. mars sipar Høgni Hoydal landsstýrismaður til eina viðmerking hjá Edmundi Joensen fólkatingsmanni um trúvirðið hjá okkara bankavinnu. Høgni leggur Edmund undir at "sáa iva um álitið á føroyska fíggjarkervið og á føroyskar myndugleikar í sambandi við, at landsstýrið fer at taka fulla ábyrgd av føroyskum fíggjarrætti".

Hetta er eftir mínum tykki at venda tingunum á høvdið. Tað fyrsta útspælið í hesum máli kom ikki frá Edmundi, men frá *tí nýggja landsstýrinum*. Útspælið var, at setast skuldi á stovn eitt føroyskt fíggjareftirlit, sum (heldur ein seg skilja) skal koma í staðin fyri tað nógv virda og óhefta danska fíggjareftirlitið.

So er nakar ivi sáddur, kemur hesin ivi frá okkara nýggja landsstýri. Tað er hesin stovnur, og bara hann, sum "sáar iva um álitið á føroyska fíggjarkervið", júst í teirri løtu, okkara bankavinna fyri einum óheftum fíggjardómstóli hevur staðið sína roynd við einum tíggjutali.

Ein krevur ikki at hava meira enn vanligt gonguvit fyri at kunna rokna út, hvørjar avleiðingar henda landsstýrisins ætlan kann fáa fyri okkara peningaviðurskiftir – og tí eisini fyri hvønn einasta borgara í okkara landi. Er onkur, ið ivast, kann hann bara kanna eftir, hvat fíggjar- og bankaserkønir sum Janus Petersen ella Peter Holm halda um hetta mál.

Ein noyðist tí, sum (ein gamaní sera lítillátin) kundi hjá peningastovnunum, sum borgari í Føroyum og sum ein, ið ynskir okkara landi góðan byr eisini í komandi tíðum, at spyrja:

Eru tit tríggir – Jóannes Eidesgaard, Høgni Hoydal og Karsten Hansen – blivnir vindandi óðir í høvdinum?

Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN

Fimtandi partur

Vit sóu seinast, hvussu tað sum Harrin talaði við Jeremias kann vera ein mynd av, hvussu bíblian kom til okkara. Vit fara nú víðari í Jeremiasar bók.

Jeremiasar bók byrjar soleiðis:

"Orð Jeremiasar, sonar Hilkia, sum var ein av prestunum í Anatot í Benjaminslandi.

Orð HARRANS kom til hansara á døgum Josiasar, kongs í Juda, sonar Amons, trettanda árið ið hann sat við stýrið, og síðani á døgum Jójakims, kongs í Juda, sonar Josiasar, líka til seinast á ellivta ári judakongs Zedekiasar, sonar Josiasar - líka til íbúgvar Jerúsalems vórðu herleiddir í fimta mánaði.

Orð HARRANS kom til mín; Hann segði." Jeremias,1,1-4.

Hetta er tað, man lesur aftur og aftur: **Orð Harrans kom til mín**. Eg taldi, inntil eg kom til sjeynda kapitul og fekk tað til ca. fimti ferðir. So gavst eg at telja.

Tað, sum Harrin talar til Jeremias um er fyrst og fremst um Ísrael og Juda. Um at venda við, um synd og ólýdni teirra og dómin yvir tey. Fólkið vil ikki lurta eftir, tí ganga tey til grundar. Jeremias profeterar eisini langt fram í tíðina, m.a. til okkara dagar. Hygg hvussu tað gongur út fyri eygum okkara. Tak hetta skrifbrotið:

"Tí skulu dagar koma - sigur HARRIN - táið tey ikki longur skulu siga: "So satt sum HARRIN livir, Hann, ið leiddi Ísraelsmenn út av Egyptalandi - " men: "So satt sum HARRIN livir, Hann, ið leiddi Ísraelsmenn út úr Norðurlandi og úr øllum londunum, hagar Hann hevði rikið teir -." Tí Eg skal flyta tey aftur til land teirra, tað, ið Eg gav fedrum teirra. Jeremias 16, 14-15."

Hetta er júst tað, sum vit hava upplivað, at síggja jødarnar koma aftur til landið , sum Harrin hevur givið teimum. Í 1948 bleiv Ísrael ein statur aftur.

Men Jeremias profeterar eisini um heidningalondini. Eins og Esaias kunngerð hann ein øðiligan dóm yvir tjóðirnar. Føroyar koma undir hendan dóm saman við øllum hinum heidnu tjóðunum. Vit kunnu ikki skjóta okkum undir, at vit eru eitt kristið land. Einki eitur so. Vit finna tað ikki í bíbliuni. Og hyggja vit rundan um okkum og lurta eftir, tí sum fer fram í millum okkara, koma vit skjótt til, at hetta er ikki eitt kristið land. Syndin ger meiri og meiri um seg, ung -og eldri við- verða forførd. Hví? Tí júst sum á Jeremiasar døgum verður ikki lurtað eftir hvat Harrin sigur.

Hugsa um alt tað, sum Jødarnir hava liðið, allur tann dómur sum er komin yvir tey, baði áðrenn og aftaná at tey róptu hini ræðuligu orðini: **Blóð Hansara komi yvir okkum og børn okkara**. Og hygg síðani eftir hesum skriftbrotunum.

Tí so segði HARRIN Gud Ísraels við meg: "Tak hetta steypið við vreiðivíni úr hond Míni og gev teimum at drekka av tí, øllum tjóðunum, ið Eg sendi teg til! øllum kongunum í norðri, nær og langt burtur, einum við øðrum - ja, øllum ríkjum heimsins á allari jørðini - og kongurin í Sesak skal drekka eftir teir.

Staðin, ið kallaður er við navni Mínum, læt Eg jú vanlukkuna koma yvir fyrst - og so skuldu tit sloppið! Nei, tit skulu ikki sleppa; tí Eg sendi boð eftir svørðinum at koma higar, yvir øll tey, sum á jørðini búgva - sigur HARRIN Gud herskaranna. Jeremias 25 versini 15- 26 og 29.

Her hava vit tað sama, sum Esaias sigur, **at jørðin riðar undir sínum misbroti**. Jesus sigur: **Himmal og jørð skulu forganga**.

Ver róligur, versins endi verður ikki meðan vit liva. Men hugsa um álvara aftanfyri alt hetta og **lat teg frelsa frá hesi rangvørgu ætt**. Tað, sum heilt vist fer at henda í okkara tíð, er at bæði eg og tú verða skjótt stevndir inn fyri henda rættvísa Gud. Jesus sigur: **Verður ein ikki føddur av nýggjum, kann hann ikki síggja ríki Guds**. "Trúgv á Harran Jesus Kristus, so skalt tú verða frelstur, tú og hús títt.. Ápostlasøgan 16,31.

Framhald

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónsleiðari: Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støddir:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.